# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*31. mars fingu Sóley og Tór Arni Samuelsen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3900 gr.*



*28. mars fingu Maria og Jógvan S. Øregaard, Odense, eina dóttur. Hon vigaði 3870 gr og var 52 cm long. Á myndini fær Emma ein lítlan muss av stórabeiggja, Jákup.*

29. mars fingu Sóley Forberg og Pauli Ellingsgaard, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3500 gr.

29. mars fingu Elisa Simonsen og Jan Venned, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4300 gr.

1. apríl fingu Juliet Trúgvadóttir og Magni Thomsen, Strondum, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3500 gr.

2. apríl fingu Jónhild og Bent Djurhuus, Strondum, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4950 gr.

2. apríl fingu Haldis og Jón Matras, Eiði, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3600 gr.

2. apríl fingu Annie Nilssen og John Henrik Holm, Vági, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 4980 gr.

4. apríl fingu Sólvá og Jógvan Egholm, Vestmanna, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3800 gr.

5. apríl fingu Alma Eivindsdóttir og Eyðstein Johansen, Sandavági, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3700 gr.

## Minningarorð um
# Kammu og Jógvan Debes



Av tí at verforeldur míni hava havt so stóran týdning fyri meg, havi eg avgjørt at skriva nøkur minningarorð um tey. Vónandi kann tað vera ein lítil uggi fyri teirra avvarðandi.

Tað eru nú liðin umleið 24 ár síðan, at eg fyrstu ferð kom inn í teirra fjálga heim; og har kendi eg meg beinanveg vælkomna. Bæði mær og soni mínum, ið tá var 4 ára gamal, varð vístur stórur kærleiki og umsorgan. Eg gloymi ongantíð, at tey keyptu eitt jólatræ bert fyri at gleða sonin hjá mær, hóast tey vóru givin at hava jólatræ. Blíðari menniskju at koma inn til, havi eg ikki upplivað, og tað munnu mong vera samd við mær í.

Bæði høvdu tey ótrúlig evni at halda saman uppá familjuna, og vóru tey altíð til reiðar, tá onkur í familjuni tørvaði einhvørja hjálp. Tað var so lagaligt hjá børnunum, tá tey komu úr skúlanum at fara niðan á Tinghúsvegin, um tað ikki lá fyri at fara heim beinanvegin. Húsini vóru altíð opin fyri teimum og øllum í familjuni. Eg hugsi m.a. um, tá man fór í býin at keypa jólagávur, og børnini vóru so smá, at tað var strævið at hava tey við, so plagdi eg onkuntíð at spyrja Jógvan og Kammu, um børnini kundu vera hjá teimum eina løtu, hetta lat seg altíð gera. Hóast Jógvan onkuntíð var einsamallur inni og longu hevði fingið nøkur børn at ansa, so var altíð gaman í at taka ímóti nøkrum afturat. Tað man hava verið strævið, men hann var so sera góður við síni abbabørn.

Jógvan og Kamma fingu 7 børn, sum øll vóru sera góð og hjálpsom móti sínum foreldrum. Familjan var so við og við vorðin stór, men har var ikki tað sum æt mismunur gjørdur móti nøkrum, og sonur mín var sum ein av teirra.

Til stóra sorg fyri øll, doyði Jógvan alt ov tíðliga av sjúku, bert knappa viku eftir at dóttir okkara, ið nú er 11 ára gomul, varð født. Kamma livdi 10 ár eftir at maður hennara doyði. Hon var ógvuliga røsk og var til arbeiðis hvønn dag. Henni dámdi m.a. væl at svimja og var ein av sonevndu »morgunfrúunum«. Eisini var hon álitið, tá ymsar veitslur skuldu haldast í familjuni.

Sum húsmóðir gjørdi hon væl og virðiliga sína skyldu, men dugdi eisini at sleppa øllum og fara at ferðast uttanlands.

Men heldur ikki hon slapp undan ringari sjúku. Ein skelkur fyri okkum øll, tí í fyrstuni varð tað bert hildið fyri at vera vanlig búksjúka. Ringa sjúkan gjørdi, at hon bleiv ógvuliga kløn, og tað var ógvuliga hart fyri okkum øll hjálparleys at síggja, at hon ið hevði livað sítt lív fyri onnur, skuldi hava tað so ringt. Kamma doyði í oktober 2003, og saknurin eftir hana er tungur at bera. Tað var mangan gott at koma inn til hana og kunna práta um bæði góð og minni góð ting. Hon var altíð so áhugað í øllum. Tað er ringt, serliga í tungum døgum, ikki at kunna fara inn til Kammu og fáa hennara umsorgan.

Tað eru nú liðin 11 ár síðan Jógvan doyði, men eg sakni hann nógv, og tað ger øll familjan og nógv onnur við, tí tómrúmið eftir hann fyllir so nógv. M.a. hansara sera lætta og skemtingarsama sinnið. Men góðu Kamma og Jógvan, tað besta er, at tit bæði nú hava fingið frið.

**Elly**

# Hans Pauli Joensen 50 ár



Hósdagin 31. mars fylti Hans Pauli Joensen á Argjum 50 ár.

Hans Pauli er føddur og uppvaksin á Argjum, sonur Maritu, f. Hansen, úr Miðvági, og Mortan Joensen av Argjum.

Hans Pauli er úbúgvin cand. scient. í alisfrøði og støddfrøði frá Odense Universiteti á summri 1980. Hann var lærari í alis- og støddfrøði á Føroya Studentaskúla í hálvtannað ár og hálvt ár á Skt. Knuds Gymnasium í Odense.

Síðan á heysti 1982 hevur hann arbeitt á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum, har hann er lektari í alisfrøði.

Í 1986 gjørdist hann, sum 31 ára gamal, leiðari á Náttúruvísindadeildini, og tað er hann enn. Í fleiri umførum hevur hann verið vararektari á Fróðskaparsetrinum.

Hans Pauli verður av sínum starvsfeløgum mettur sum ein hollur vísindamaður, og samstundis er hann sera sosialur og umgongiligur.

Í gransking hevur hann arbeitt við havfrøði, veðurfrøði, vindorku og seinnu árini mest við kanningum av geislavirknari dálking av umhvørvinum. Kanningarnar av geislavirkni verða gjørdar í norðurlendskum og arktiskum høpi.

Tað var Tjernobylvanlukkan í 1986, sum førdi til økta gransking innan geislavirkna dálking, bæði í Føroyum og í útheiminum.

Hans Pauli hevur serligan alsk til ellisakfør, hann er limur í áhugafelagnum Føroya Ellisakfør og eigur bæði bilar og motorsúkklur. Eisini er hann aktivur 1. tenorur í Tórshavnar Manskóri.

Hann er giftur Katrin Joensen, f. Johansen, av Strondum, og tey eiga tveir synir, Magnus og Mortan.